# Mangir eru Brandar í føroyskum tónleiki

At trummuleikarar geva fløgu út, er ikki gerandiskostur. Serliga ikki her hjá okkum. Men ein trummuleikari hevur júst givið eina fløgu út. Trummuleikarin Brandur Jacobsen hevur staðið á odda í fløguætlanini 7th Heaven, ið er ein sonevnd konseptfløga, har farið verður at taka upp, uttan venjing. Tað tók bert tríggjar tímar at taka fløguna upp




*Brandur Jacobsen, trummuleikari, við fløguni 7th Heaven. Hann hevur staðið á odda fyri ætlanini, ið er serstøk, tí so lítið er avgjørt frammanundan upptøkunum, men tó er dygd komin burturúr, í støðum væl swingandi reggaetónleikur. Ikki tungur jazzur, so ongum nýtist at skrúva fyri av teirri orsøk*

**TÓNLEIKUR**
*Dagfinn Olsen*

Seinnu árini hava vit sæð nógvar Brandar í føroyskum tónleikalívi. Summir brandar bjartari, enn aðrir. Brandurin, ið hevur logað longst, er helst Brandur Øssursson. Bjartasti login í løtuni er kanska Brandur Enni. Men ein neisti, ið er vorðin til ein støðufastan brand í føroyskum tónleikalívi, er trummuleikarin Brandur Jacobsen.

Hann kom av álvara fram blaðungur fyri eini 10-15 árum síðani, tá ungir menn, m.a. Hans P. í Brekkunum, stovnaðu bólkin Paria. Seinnu árini hevur Brandur leikt nógv jazz. Og Brandur hevur borgað fyri støðugum hita í rútmunum í mongum bólkum, ikki minst í bólkinum Ivory, við Eivør Pállsdóttir á odda.

### Minor-Bran-Dur

At trummuleikari gevur út fløgu, er ikki gerandiskostur. Og slett ikki í Føroyum.

Brandur Jacobsen hevur staðið á odda í fløguætlanini 7th Heaven.

Hetta er serstøk fløga longu frá byrjan. Altso frá hugskotinum av. Eitt verður nevnt konseptfløga.

Minor-Bran-Dur og 7th Heaven er ein fløga, har fyrsti tónin ger av, hvussu leikur fer. Dygdargóðir tónleikarar finna saman. At jamma, sum tað nevnist millum tónleikarar. Men tað hendir jú, tá køn fólk eru saman á røttum stað til røttu tíð, at gandur kemur í. Dygdin blómar. Ein kemur í sjeynda himmalin.

Og tað hendi, tá Brandur Jacobsen fór at savna saman køn fólk. Leivur Thomsen, guitar, Mogens Palsbøl, bass, Deborag Herbert, sang og Brandur sjálvur á trummur. Hesi hittust í upptøkuhølunum hjá Róin Siggertsson (Rowan) í Keypmannahavn. Hølini nevnast Sasquash Productions.

### Í sjeynda himni

Brandur savnaði saman hesi kønu fólk í Keypmannahavn, "og der opstod sød musik", sum ein dani kanska hevði tikið til.

Í øllum førum tók tað bert 3 tímar at taka upp. Ætlanin var bert at gera demo upptøkur, men tá lurtað varð aftur var greitt, at her var tilfar til útgávu. So gott var tilfarið, ella er, - so góð var løtan - at tað kanska eisini hevur givið íblástur til heitið 7th heaven.

Bert eitt vóru tey samd um, tá farið var innar í upptøkuhølini: fyrsti tónin legði botn í og var grundarlag undir tí, ið síðani varð leikt.

Sum Brandur sjálvur tekur til á fløguhúsanum, so var tað dygdargóðu tónleikarunum fyri at takka, at tað tók so stutta tíð og at úrslitið gjørdist so framúr. Tað var Brandi ein sonn fragd at sleppa at uppliva spælda tilfarið enn einaferð.

Og tað er tað eisini hjá okkum øðrum.

Her er ikki talan um tungan jazz, sum mong bert hoyra, tá tey av misgávum fáa eina "ringa" fløgu í føðingardagsgávu. Her nýtist ongum at skrúva fyri.

Her er talan um góðan tónleik, leitandi í støðum. Men tó óvæntað melodiøst. Serliga reggae rútmurnar og løgini fanga, so ein skuldi hildið, at her var komponerað við sveittabrotið í tímavís, fyri at finna ein sonevndan oyrahangara.

Ein flott fløga. Frá hugskotið, byrjan til enda!

Minor og dur, moll og dur. Jú her verður leikt bæði uppá moll og dur kenslur. Ein brandur er kyndur, ið ikki slóknaði eftir endað spæl, men sum logar víðari á fløguni í sjeynda himni. Tíbetur.

Løg og tekstir gjørdi manningin, uttan eina tekstin. Rowan og Brandur framleiddu. Rowan og Jónas Bloch Danielsen tóku upp og Rowan ljóðblandaði. Lenhert Kjeldsen mastraði, Beinta Hansen gjørdi húsan, sum Høgni Egholm Magnussen setti saman.

Tað er Tutl, ið gevur út.









*Sigrid Sivertsen stjórnar Stjørnuskotunum*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

# Tey sungu við lív og sál

## Konsertin við Ungu stjørnuskotunum í kommunuskúlaauluni var stak væl eydnað

**UMMÆLI**
*Hans Egholm*

Í fullsettari kommunuskúlaaulu mikukvøldið 15. mai sótu foreldur, systkin, ommur og abbar, vinir, kenningar og onnur, og lýddu á Ung Stjørnuskot, ið framførdu góðan rútmiskan tónleik..

Áðrenn konsertin byrjaði greiddi leiðarin Sigrid Sivertsen frá, at konsertin mikukvøldið var endabresturin av eini sera væleydnaðari konsertferð í Danmark. Greitt var í stuttum frá um skránna, har áhoyrararnir komu at hoyra nøkur av løgunum, ið Ung Stjørnuskt høvdu sungið á ferðini.

Talan var bæði um nýggjan og eldri tónleik, har hesi ungu stjørnuskotini eisini høvdu havt ein fingur við í leikinum, tá talan var um at mynda fjølbroyttu skránna.

Sigrid gjørdi vart við, at kommunuskúlaaulan var frálíka væl egnað til sang, men at hetta rútmiska kórið eisini nýtti elektrisk ljóðføri av ymiskum slag, og at hesi gjørdu at aukustikkurin ikki bleiv so góður, - kanska fóru ljóðførini at ljóða í so hart og órógva meira enn neyðugt var.

Ikki bar til at gera hølini um, so hon vissaði okkum áhoyrarum um, at allir sangarar og leikarar fóru at gera sítt allarbesta fyri, at ljóðið skuldi blíva so gott sum møguligt og vónaði at vit fingu eina góða konsert, - og tað skal eg heilsa og siga, at tað fingu vit.

Lagt var út við kórsangi, har meira ella minni øll í kórinum sungu við og vælspælandi tvørfloytutónleikararnir hóskaðu væl til allar sangirnar, har hesar vóru við. Byrjanin var annars merkt av eitt sindur av fjáltri, - tað var sum um ikki allar mikrofonirnar vóru rætt innstillaðar, og at tónleikararnir spældu ov hart, - júst, sum Sigrid hevði greitt frá, áðrenn konsetin byrjaði, viðvíkjandi aukustikkinum.

Tá alt kom til alt hevði hetta onki at siga, aftaná tvey ella var tað trý tey fyrstu løgini var innstillingin av tónleikinum og kórsanginum væl tilpassað og konsertin bleiv bara betri og betri.

Ikki ber til hjá mær at nevna nakran, ið skaraði framúr, - tey sungu øll somul framúr væl og reint, - við lív og sál, - men tey ið sungu fyri til fleiri av løgunum høvdu góðar gávur, tað hoyrdist á øllum brøgdum.

Á skránni vóru løg eftir bólkum sum The Beatles, Back Street Boys, Mettalica Five, Celine Dion og fleiri Gospelløg.

Móti endanum av konsertini var meira lív komið í bæði sangarar og áhoyrarar, sum nú eisini vóru farnir at klappa við í takt og onkur hoyrdist eisini syngja við til hesu kendu melodiøsu løgini.

Serliga var tað lagið “Drive my car” hjá Beatles, sum nøkur av ungu stjørnuskotunum framførdu, ið fekk áskoðarafjøldina at reisast, - framman fyri pallin, á hála gólvinum, var fimleikur og “break” dansur framførdur av sangarunum, alt ímeðan tónleikurin og sangurin ljómaði úr hátalarunum.

Nú havi eg ikki nevnt nógv um tónleikararnar, men sum áður nevnt spældu tríggjar gentur tvørfloytu, annars vóru tað dreingir ið leikaði á guitarar, trummur, tangentar o.s.fr.. — at hesi, eins og allir sangararnir hava fingið holla vegleiðing og undirvísing hoyrdist týðiliga.

Tað lá væl fyri at syngja og spæla og so ljóðaði tað so stak væl eisini.

Frálíka væl eydnað konsert við hesum ungu stjørnuskotum, ið áhoyrararnir klappaðu uppaftur á pallin til eitt eykanummar, - sonn Stjørnuskot, - flott, flott.